VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
At byrja við upp í hvassan vind av landsynningi, sum støkkur vesturum til útsynning, minkandi niður í gul til stívt andøvsgul, og um náttina av suðri. Tað slítur í og sólin sær, men móti kvøldi ælaveður. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri. Skýggjað og ælaveður. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, út á dagin upp í hvassan vind av eystri og um náttina av norði. Skýggjað og nakað av regni í skiftum. Hitin millum 7 og 10 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Hvassur vindur av norði, minkandi niður í lot til andøvsgul. Skýggjað og í skiftum regn ella ælaveður. Hitin millum 7 og 10 stig.

Tey ganga á gomlum gøtum

Varðagøtan millum Lamba og Rytuvík er nú sett í stand og lýst við skeltum og gongupelum. Runavíkar kommuna hevur sett tilsamans sjey bygdaskeltir upp í ymisku bygdunum í kommununi

GAMLAR GØTUR

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Síðsta hósdag vóru øll starvsfólkini í býráðshúsinum hjá Runavíkar kommunu úti og gingu eftir gomlu varðagøtuni úr Lamba til Rytuvíkar.

Runavíkar kommuna hevur syrgt fyri, at gøtan er merkt við skeltum og gøtupelum, har eingir varðar eru at ganga eftir. Gøtupelarnir vórðu settir upp á ferðini hósdagin.

Kommunan hevur eisini sett upp trý varðagøtuskeltir.

Eitt er niðri í Lamba (sí mynd). Túrurin er ætlaður fólki, sum ynskja at ganga ein langan og ein eitt sindur strævnari túr.

Eitt skelti er sett upp við vegin niðan á Húsloft. Hesin túrurin er ætlaður teimum, sum ikki ynskja at ganga so langt.

Síðan er eitt triðja skelti sett upp í Rytuvík. Hetta skeltið er ætlað teimum til kunningar, sum ganga túrin úr Rytuvík.

Runavíkar kommuna sigur, at varðagøtan, Lamba-Rytuvík, er eisini við í nýggja gongufaldaranum, »Færøerne til fods«, sum Ferðaráð Føroya gav út í september í ár.

– Tískil mettu vit, at rætt var at seta hesa gøtuna í stand fyrst.

Umframt at varðagøtan millum Lamba og Rytuvík nú er sett í stand og lýst við skeltum og gongupelum, hevur Runavíkar kommuna eisini sett tilsamans sjey bygdaskeltir upp í ymisku bygdunum í kommununi. Øll skeltini eru á trimum málum og eru sostatt ætlaði bæði føroyingum og útlendingum, sum vitja í Runavíkar kommunu.

– Ætlanin er at halda fram við at seta upp skeltir til aðrar varðagøtur og onnur áhugaverd stað í kommununi.

Í Runavíkar kommunu siga tey, at skeltingin er liður í nýggju skeltisskipanini, sum Ferðaráð Føroya tók stig til í ár 2001.

Her byrjar ferðin – úr Lamba til Rytuvíkar - hjá starvsfólkunum í býráðshúsinum í Runavíkar kommunu

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷9
Nuuk	÷6
Qaqortoq	7
Ammassalik	2
Saint John's	0
Halifax	2
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	10
Lerwick	9
Aberdeen	9
London	12
Tromsø	3
Bergen	7
Oslo	–
Stokkhólm	–
Keypmannah.	4
Helsinki	4
Moskva	0
Berlin	2
Warzawa	6
Kiev	2
Bukarest	3
Paris	13
Madrid	13
Róm	19
Malorca	20
Athen	11
Malta	19
Tunis	21
Beijing	8
New Dehli	25
Bangkok	33
Jakarta	33
Sydney	–
New York	7
Miami	27
Los Angeles	20
Meksikobýur	19
Panama	30
La Paz	14
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst í ein landsynning úr Kappanum gongur norðureftir og grynnist, meðan eitt hátrýst yvir Baltisku londunum viknar og gongur í ein sunnan.



Hósdagin tekur eitt djúpt lágtrýst seg upp í útsynningi úr Írlandi og fríggjadagin gongur tað í ein landnyrðing yvir Skotland og víðari eystan fyri Føroyar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/11 kl. 06⁰⁰– 11/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,6°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 1,0 mm – mált frá 10/11 kl. 06⁰⁰–11/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 47,9 mm

VESTFALLSKYRRINDI

9. november: Fullmáni
10. november: Mánin longst frá jørðini
17. november: Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
12. nov	08.40	21.03	07.40	20.03	07.55	20.18	10.40	23.03	11.40	—	06.55	19.18	05.55	18.18	08.55	21.18	09.55	22.18	08.25	20.48	09.40	22.03
13. nov	09.26	21.49	08.26	20.49	08.41	21.04	11.26	23.49	00.03	12.26	07.41	20.04	06.41	19.04	09.41	22.04	10.41	23.04	09.11	21.34	10.26	22.49
14. nov	10.12	22.35	09.12	21.35	09.27	21.50	—	12.12	00.49	13.12	08.27	20.50	07.27	19.50	10.27	22.50	11.27	23.50	09.57	22.20	11.12	23.35
15. nov	10.58	23.21	09.58	22.21	10.13	22.36	00.35	12.58	01.35	13.58	09.13	21.36	08.13	20.36	11.13	23.36	—	12.13	10.43	23.06	11.58	—

5 707265 100036 >